# Anne Grete Mikkelsen til hungursrakta Darfur



*Anne Grete Mikkelsen var ómetaliga kedd, tá hon mátti fara úr Føroyum, tí henni dámdi so avbera væl her.*
*– Eg ynski ikki at minnast tað keðiliga, men bara at goyma tey góðu minnini, eg havi um tíðina í Føroyum, sigur hon.*
*Í gjár fór hon til hungursrakta Darfur-umráðið í vestara parti av Sudan í starv sum leiðari á deildum hjá felagsskapinum Læknar uttan Landamørk*

**Í gjár fór Anne Grete Mikkelsen til hungursrakta Darfur-umráðið í vestara parti av Sudan. Vit hittu Onnu Gretu í telefonini, beint áðrenn hon fór avstað**

LÆKNAR UTTAN LANDAMØRK
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Komandi seks mánaðirnar skal fyrrverandi læknastjórin, Anne Grete Mikkelsen, leiða barnadeildirnar og deildirnar fyri internt medisin á einari av deildunum hjá Læknum uttan Landamørk í býunum Sarfir Umra og Birka Sayra í norðrara parti av Darfur.

Anne Grete sigur, at hon síðani í november hevur gjørt seg til reiðar til hetta starvið við eitt nú at hava verið í Svøríki og endurútbúgvið seg.

Hon sigur, at hon altíð hevur verið áhugað í humaniterum arbeiði og tí gleðir seg at sleppa í gongd við hetta sera spennandi og meiningsfylta arbeiðið.

Anne Grete kom til Føroya, tá hon varð sett í starv sum læknastjóri við Sjúkrahúsverkið. Men stólurin har gjørdist heitari, enn hon hevði droymt um, og í fjør heyst pakkaði Anne Grete sekkin og fór aftur til Danmarkar.

Tað var hon ómetaliga kedd um, tí henni dámdi so avbera væl í Føroyum.

- Eg ynski ikki at minnast tað keðiliga, men bara at goyma tey góðu minnini, eg havi um tíðina í Føroyum, sigur hon.

Hon fekk løn eina tíð eftir, at hon var farin úr starvi, og ta tíðina og pengingin hevur hon nýtt at endurútbúgva seg til tað arbeiði, sum hon nú fer undir.

MSF hevur síðani desember í fjør virkað í Darfur, har tey 100 altjóða- og 2000 sundanesisku hjálparfólkini geva heilivág og føði til tey meira enn 600.000 innanhýsis flóttafólkini.

Í løtuni eru meira ein millión burturrikin sudanesisk flóttafólk í Darfur, og um 190.000 sudanesisk flóttafólk eru farin um markið til grannalandið, Tshad.

Umframt at taka sær av niðurundirkomnum børnum, viðgera læknarnir hjá MSF eisini offur fyri harðskapi og neyðtøkum.

Anne Grete Mikkelsen er fødd og uppvaksin í Ringkøbing. Hon tók læknaprógv í Århus 1970. Fekk serlæknaviðurkenning í tí, sum rópt verður "intern medisin", í 1981.

Í 1991 tók hon við sum yvirlækni á Faaborg sjúkrahúsi, og í 1993 gjørdist hon administrerandi lækni har.

Í 2000 varð hon sett í starv sum læknastjóri við føroyska sjúkrahúsverkið og starvaðist har, til hon í fjør heyst fór niður aftur til Danmarkar.






## Lærlingur/ skrivstovufólk

Søkt verður eftir lærlingi/skrivstovufólki til bókhaldið hjá Atlantic Airways á flogvøllinum.

Arbeiðið umfatar alt vanligt bókhaldsarbeiði.

Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarin hevur FHS-, HH- ella liknandi prógv. Vit rokna við, at umsøkjarin er ágrytin og kann arbeiða sjálvstøðugt, dugir at arbeiða við teldu, hevur góðan røkjuskap, dugir at samstarva og hevur yvirlit.

Skrivlig umsókn og prógv verða at senda til Atlantic Airways, 380 Sørvági, í seinasta lagi 15. august 2004.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Atlantic Airways á tlf 34 10 32, 21 37 03 ella 34 10 33.

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo




# Løgmaður heldur røðu fyri samkyndum

**Ólavsøkuaftan skipar Friðarbogin fyri konsert í Grasagarði, har løgmaður eisini fer at halda røðu**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Ólavsøkuaftan, beint eftir kappróðurin, kunnu fólk leita sær niðan í Grasagarð, har Friðarbogin, felagið hjá teimum sam- og tvíkyndu, skipar fyri eini rokkonsert.

Í Grasagarði verður eisini kafé, tombola og Friðarbogin hevur ymiskt til sølu, eitt nú t-troyggjur, lyklaringar og pennar. Tiltakið byrjar klokkan 18 og hildið verður á til á midnátt.

Klokkan sjey heldur løgmaður røðu.

Bólkarnir, ið framføra eru:
The Story Ends
Hatespeech
Sic
Zink
Makrel
Mc Hár

- Vit eru sera glað um, at Jóannes Eidesgaard hevur játtað at halda røðu til konsertina. Hetta er eitt slag av váttan um, at Friðarbogin verður góðtikin sum eitt seriøst felag, ið arbeiðir við viðurskiftunum hjá sam- og tvíkyndum her á landi. Samstundis er hetta ein váttan um, at tað er OK at vera øðrvísi, sigur Tina K. Jakobsen, forkvinna í Friðarboganum.

Friðarbogin vónar, at nógv leita sær oman í Grasagarð, og at fólk hugna sær. Konsertin er ókeypis, eisini ber til at tekna seg sum lim ella stuðulslim í felagnum.



# Siglingin á Kaldbaksfirði 18. juli



TÍÐINDASKRIV
*Frá Seglinum*

Sunnudagin 18. juli varð siglt á Kaldbaksfirði. 25 bátar luttóku. Veðrið var at kalla ov gott til sigling. Tá segl vórðu sett, datt lotið burtur. Stundum ein ond undan, men so ein kild ímóti. Bátanir høvdu hug at treiskast, og tá 3 tímar vóru farnir, vóru at kalla allir komnir á mál.

So var farið til vælbúgvið borð í skúlanum í Kaldbak.

Teir fyrstu 17 bátanir vóru:

| Nr. | Bátur | Manning | Bygd |
|---|---|---|---|
| 1 | Leivur | Petur Petersen | Kollafjørður |
| 2 | Hoyviksbáturin | Egil Simonsen | Hoyvík |
| 3 | Niels í Nesinum | Alfred Gullbein | Havn |
| 4 | Falkurin | Kári Hansen | Strendur |
| 5 | Ternan | Kári Borgarklett | Hósvík |
| 6 | Nón | Agnar Olsen | Hósvík |
| 7 | Birgishamar | Esmar Petersen | Kollafjørður |
| 8 | Miðgerð | Arngrím Petersen | Kollafjørður |
| 9 | Elisabeth | Símun Olsen | Vestmanna |
| 10 | Helga | Kaj Johannesen | Kaldbak |
| 11 | Góðadalsbáturin | Eli Joensen | Leirvík |
| 12 | Kristian á Flötti | Kristian Siversten | Funningur |
| 13 | Búgvin | Per Mikkelsen | Strendur |
| 14 | Kollsteinur | Mikkjal Hansen | Hósvík |
| 15 | Sildin | Jónsvein Mikkelsen | Toftir |
| 16 | Vinur | Anfinnur Mikkelsen | Leirvík |
| 17 | Luddi | Karl Thomasen | Kollafjørður |

